## HEILSANIR



Eg og foreldur míni takka øllum, sum mintust meg á fermingardegnum tann 10. okt. 04. Gleðilig jól og gott nýggj.
**Heilsan Bjørg Klakstein, Klaksvík**



Foreldur míni og eg takka hjartaliga øllum tykkum, ið vórðu við til at gera fermingardag mín 10. oktober 2004 so hugnaligan og minnisríkan. Gleðilig jól og gott nýggjár.
**Heilsan Dánjal H. Hestoy**

**Til børnini í Gjónni**
Nú havi eg verið á Sosialinum og vitja Jan Müller. Hann tók eina mynd av mær og lovaði eg skuldi sleppa at ynskja tykkum gleðilig Jól.
**Heilsan Nissu Lena**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku við 23 ára degnum. Vit elska teg.
**Heilsan Hans Erland og Dan**





**Góði Palli**
Hjartaliga tillukku við degnum 23 des. Við ynskjum um alt tað besta framyvir
**Bestu heilsur frá okkum á Búðabeitinum**



Hey, hesin sjeikurin.........., ja tey siga hann fyllur gott 60, men hann heldur sjálvur, at prestur hevur tikið feil. Tað er ikki meira enn 40. Líkamikið, hav ein góðan dag.
**Jovina og Lýðar**

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

## Heilsanir

30,- kr.
Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:......................................................................
.....................................................................................
.....................................................................................
.....................................................................................
.....................................................................................
.....................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: ....................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**

# Bakka ikki longur

FISKASØLA
*tíðindaskriv frá Ráfiskakeyparafelgnum*

Nevndin í Ráfiskakeyparafelagnum hevur á nevndarfundi 21/12 avgjørt, at fiskavirkini ikki kunnu bakka longur enn tað sum nú liggur á borðinum. Profomasølurnar skulu burtur og fiskurin seljast av loyvishavara.

Ein av stóru trupulleikunum, sum hevur merkt samfelagið farna árið, er vaksandi útflutningurin av óvirkaðum fiski. Í 2003 vóru 33% av veiðini av toski, hýsu og upsa útflutt heilt, í mun til 13% í ár 2000. Parturin av óviðgjørdum fiski til útflutning hevur verið veksandi í 2004.

Virðisøkingin av fiskinum er ikki her heima, og føroyska samfelagið missir stórar inntøkur. Fyri fiskavirkini merkir óstøðug rávørutilgongd at føroyska vinnan ikki kann geva tað leveringstrygd, sum útlendski marknaðurin vil hava.

Avleiðingarnar av hesum hava verið sjónligar í ár. Minni arbeiði og vaksandi útgjald úr fiskavirkisskipanini hjá ALS, og fíggjarliga úrslitið hjá virkjunum í ár verður sera vánaligt.

Ráfiskakeyparar og ráfiskaseljarar royndu í eitt heilt ár at finna eitt felags stev, fyri at fáa loyst nógvar av átrokandi spurningum í karmunum fyri fiskivinnuna og fiskavirkini, og komið var til eina semju. Men í síðstu løtu vrakaði ein meiriluti av seljarunum semjuna.

Henda støðan fekk landsstýrismannin í fiskivinnumálum til, fyrst í november, at leggja sokallaða fiskapakkan fram.

Ráfiskakeyparafelagið hevur alla tíðina verið av tí áskoðan, at vinnan skal royna at loysa sínar trupulleikar sjálv. Tí hevur felagið einaferð enn roynt at finna eina semju millum keyparar og seljarar, og sum Fiskimannafelagið eisini var partur av. Eftir tógvið stríð eydnaðist hesaferð at koma á mál.

Í síðstu semjuni hevur Ráfiskakeyparafelagið givið seg nógv í mun til fiskapakkan, sum Fiskimálastýrið legði fram - t.d. bert helvtin av ávísum fiskasløgum skal støddarskiljast, somu møguleikar verða at avreiða uttanlands, eingin bót fyri at selja meira enn loyvt o.s.v. Men enn einaferð eru partar av Ráfiskaseljarafelagnum, sum ikki taka undir við semjuni.

Nevndin í Ráfiskakeyparafelagnum hevur á nevndarfundi 21/12 avgjørt, at fiskavirkini ikki kunnu bakka longur enn tað sum nú liggur á borðinum. Profomasølurnar skulu burtur og fiskurin seljast av loyvishavara.

Nevndin í Ráfiskakeyparafelagnum heldur at gongdin higartil vísir, at talan er ikki um samráðingar millum tveir líka partar, tá talan er um seljarar- og keyparar. Seljararnir hava fiskiloyvini og ræðisrættin til fiskin. Teir hava tí øll kort á hondini. Endin kann tí gerast, at politikararnir noyðast at avgera, hvat teir vilja við føroyska tilfeinginum.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!